

Flogternur hjá Air Asia

MYNDIR: FLOGFELØGINI OG PRIVATAR

# Stuttligt í luftini

VIT HAVA **YMISKAR** MEININGAR UM, **HVUSSU** TAÐ ER AT **FLÚGVA** – SUMMI ERU **BANGIN**, ONNUR **NJÓTA** FRIÐIN, OG **AFTUR** ONNUR **KEÐA** SEG. SEINASTA **RÁKIÐ** Í LUFTINI ER, AT **FLOGTERNURNAR** SKULU **UNDIRHALDA** OKKUM – OG IKKI **BARA** VIÐ MATI OG **DRYKKI**. **NÚ** SKULU TÆR **DANSA**, RAPPA OG HAVA **KANINOYRU** Á HØVDINUM



**FLÚGVING**

Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

Tá ið ein av vinkonum mínum kom umborð á Air Asia fyrr í ár, bleiv hon sera bilsin. Flogternan, ið tók ímóti henni – »Senior flight attendant« – hevði hvít, loðin kaninoyru á høvdinum. Hetta var ikki, tí tað var fyrsti apríl, ella at tað var árið hjá kaninini, men hinvegin boð frá leiðsluni at gera flogtúrin stuttligari.

Vinkonan fortelur, at hon visti ikki rættuliga um hon skuldi flenna ella gráta, men at hesin túrurin nokk ikki fer líka skjótt í gloymibókina sum nógvir aðrir.



Dansur hjá Cebu Pacific Airlines



David Holmes rappar

Hendan flogternan var ikki tann fyrsta av sínum slagi. Í fjør gjørdist David Holmes, ið starvast á Southwest Airlines í USA, heimskendur, tá ið hann rappaði trygdarboðini til ferðafólkini. Eitt av ferðafólkunum tók uppá video og legði út á YouTube, og vups, so hevði David Holmes skapt eitt nýtt rák millum flogternur.

Í filippinska flogfelagnum Cebu Pacific Airlines sleppa flogternurnar ikki fram at mikrofonini, har dansa tær til Lady Gaga og Katy Perry, meðan tær vísa, hvar neyðdyrnar eru, og hvussu bjargingarvesturin skal blásast upp.



So Magni Arge, nú veit tú, hvat skal til! Næstu ferð vit sessast í Atlantic, verður tað kanska til rapp og kaninoyru!



TILGJØRD MYND

## INNIHALD

2 KLUMMA: **FÓLKIÐ KANN FLYTA OG FLYTAST**
4 INTERVIEW: **LINDA ANDREWS**
6 TIPS: **TRÝ VÁRPLØGG**
8 90 SEKUND
10 BØRN: **OKKARA BØRN DUGA IKKI ALT**
12 TAÐ ER TÍÐIN: **TØKNI, HEILSA OG TÓNLEIKUR**
14 Í RANGASTRÚPAN: **YMISKT ÚR MIÐLUNUM**
14 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
18 TIL ARBEIÐIS: **MAIKEN DURHUUS**
20 HUGLEIÐING: **SAMTÍÐARLIST Í ALMENNA RÚMINUM**
24 SØGULIG HENDING: **TÁ IÐ REAGAN VARÐ SKOTIN**
26 KAPPINGAR: **VINN GÓÐAR VINNINGAR**
30 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
31 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
32 VIKUMYNDIN: **NAOTO KAN**

**KLUMMAN**



*Eyðun Klakstein*

# Fólkið kann flyta og flytast

Seinastu tíðina hava vit sæð fleiri dømi um, hvussu fólkið kann flyta og flytast.

Tá ið fjøldin veruliga vil nakað, fær hon ávirkan og vald. Og vil nakar nakað við fjøldini, so ber eisini nógv til eftir stuttari tíð. Fólkið kann gera imponerandi broytingar og kann gera skjótar niðurstøður av ógvusligum hendingum, men fjøldin kann eisini flytast langt av óbetýðiligum tingum.

Vit hava nýliga upplivað, at í londum, har strong stýri hava sitið við valdið í fleiri áratíggju, hevur fólkið gjørt uppreistur og fingið valdsharrarnar frá. Tá ið fólkið hevði fingið nokk av ræðslu og ræði og segði stopp, so var liðugt. Veruliga valdið vísir seg at liggja hjá stóru mannamúgvunum. Tá ið tær fara á gøturnar, er trupult at standa ímóti. Tað mugu sjálvt teir valdmiklastu leiðararnir ásanna.

Vit uppliva eisini, hvussu einstakar hendingar ella einstøk mál kunnu broyta politiska veruleikan eftir ongari tíð. Tað, sum vendi upp, vendir niður, tí fólkið broytti hugsan. Nú um dagarnar tapti flokkurin hjá Angelu Merkel, ríkiskanslara í Týsklandi, valið í Baden-Wuerttemberg til tey grønu og reyðu. Hetta er fyrstu ferð í 60 ár, at Kristiligu Demokratarnir ikki hava valdið í Baden-Wuerttemberg. Ein høvuðsorsøk til, at alt knappliga vendi upp og niður, var kjarnorkuvanlukkan í Japan. Fólk fóru at stúra, og tað fekk tey at flyta frá Kristiligu Demokratunum til tey grønu, sum stríðast ímóti kjarnuorku. So knappliga kann politisk siðvenja hóast alt broytast.

Vit síggja eisini onnur meira óskyldig – ella kanska meira álvarsom – dømi um, hvussu fólkið kann førkast. Finalan í donsku X Factor kappingini hevur júst verið. Finalan varð hildin í Parkini í Keypmannahavn, har 45.000 vill og spent fólk vóru til staðar. Hyggjaratølini settu nýggj met, tí 2,4 milliónir fólk fylgdu finaluni í sjónvarpi. Fyri nøkrum fáum vikum síðani kendi ikki ein kleyv Babou, Sarah og Anne Louise. Men eftir intensivt propaganda-sjónvarp í tveir, tríggjar mánaðir, var alt á gosi. So sterkur miðil er sjónvarpið. Og so skjótt kann fólkið flytast.

Eg skal lata verða við at pástanda, at tað, sum hendi í Týsklandi fyri 70 og 80 árum síðani í prinsippinum kundi hent aftur á okkara døgum. Kanska fólkið hevði sett seg upp ímóti harðrendu yvirvøldini, áðrenn tað kom so vítt. Men eitt er víst.

Fólkið kann flytast – og fólkið kann flyta!

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Linda Andrews / DR